# Frá piparnøtum til milliardahandil

**SIÐIR** Tær fyrstu jólagávurnar vóru sum oftast restir frá jólabakstrinum. Síðani eru tær vaksnar og øktar, ár undan ári



**GÁVUR**

*Munur er á gávunum nú og fyri 200 árum síðani. Nú er nærum ikki pláss undir jólatrænum fyri gávum*

Tilvildarlig mynd

Snorri Brend

Hví geva vit hvørjum øðrum jólagávur?

Spyrt tú børnini, halda flestu teirra, at jólini mugu verða skapt við gávunum sum endamál.

Tá jólatræið í mongum heimum stendur umgyrt av litríkum gávum, kann ein lættliga gloyma, at gávurnar eru ein fylgja av boðskapinum um jólini, og ikki øvugt.

At tað gjørdist so, eru mangar frágreiðingar uppá. Ein teirra er í øllum førum tann at Jesus-barnið í krubbuni eisini fekk gávur.

"Og teir fóru inn í húsið og sóu barnið hjá Mariu, móður síni; og teir løgdust á knæ og tilbóðu tað; og teir lótu upp goymslur sínar og bóru tí gávur: gull og roykilsi og myrru", sum tað ljóðar í evangeli'inum eftir Matteus, tá hann greiðir frá vitjanini hjá vísmonnunum í fjósinum í Betlehem.

### Siðir

Tað at geva gávur hevur so líðandi funnið sína skipan, og hevur so líðandi fylgt við innrásini av jólatrøum í byrjanini av 1800-talinum.

Børnini høvdu sjálvsagt áðrenn tað fingið gávur á jólum, men tær vóru ikki altíð pakkaðar inn og vóru oftast okkurt etandi, sum til dømis nakrar piparnøtur, køkur ella onkur leivd frá jólamatinum.

At børn fáa leikur er tó kent heilt afturi frá 1700-talinum, sambært sið-granskaranum, Jørn Piøs í bókini "Bogen om julen", og sum Kristelig Dagblad hevur hugt í.

Í satiriska leikinum "Jule-Stue" frá 1724 kann ein til dømis lesa um, hvussu *"det er en kunst at dele gaver ud blandt børn, så alle kan blive fornøjet. Denne hest med fløjten i rumpen skal Christopher have. Vognen, hvem skal jeg give den? Den vil jeg give til lille Henning ..."*.

Gávur millum tey vaksnu er ein yngri siður enn gávur til børn. Í byrjanini var hetta avmarkað til, at tænastufólkið á gørðunum, í teim fínaru heimunum og hjá kongi fingu eitt sindur av mati, øli ella ljós frá arbeiðsgevara sínum.

Síðani byrjaðu hjúnafelagar at geva hvørjum øðrum gávur. Tað seinasta skotið í gávugevingini - at børn geva foreldrum sínum gávur - gjørdist fyrst ein siður fyri eini 70-80 árum síðani.

Síðani tá er hetta bara økt og økt, ár fyri ár, og hjá donsku smásølunum væntar ein, at jólahandilin í ár verður 10-tals milliardir krónur.

Hetta er enn einaferð met, og ógvuliga langt frá teimum piparnøtunum sum vóru givnar sum gáva á jólum.

# Jólini kosta 4400 krónur

**NÝTSLA** Jólini eru í hondum, og tey verða kostnaðarmikil. Í miðal verður roknað við, at fleiri familjur fara at brúka einar 4400 krónur í gávum, mati og prýði. Hetta er kortini undir miðal fyri alt Europa.

**Danmark:** Gávur til familjuna, dunna, marsipan og jólatræ. Innkeypslistin til jóla er langur í teimum flestu familjunum, og tað er rokningin eisini: Ein donsk familja fer at brúka omanfyri 4000 krónur í ársins jólahandli.

Hetta vísir ein evropeisk kanning av væntanini til ársins jólahandil, og sum Centre for Retail Research hevur gjørt fyri nettænastuna Kelkoo.

Gávurnar er største útreiðslan í jólaroknskapinum. Í miðal fara donsku familjurnar at brúka 2400 krónur til gávur, 1340 krónur til mat og drykkivørur, 365 krónur til jólaprýði og 295 krónur til flutning.

Tær flestu jólagávurnar í ár innihalda klæðir og skógvar, og síðani elektronikki, leikum og smyrsli. Hóast hetta liggja danir undir evropeiska miðaltalinum, sum eru 4423 krónur fyri húskið.

Greiningin hevur hugt eftir jólanýtsluni hjá familjunum í níggju evropeiskum londum - Bretlandi, Fraklandi, Týsklandi, Danmark, Italia, Noregi, Hálandi, Spania og í Svøríki.

Jólini kosta mest í Bretlandi. Har brúkar hvørt húskið 6641 krónur, meðan familjurnar í Hálandi einans brúka 3300 krónur.

Danir eru kortini á odda í einum, nevniliga í prýði. Donsku familjurnar brúka mest uppá jólaprýði og dekorasjónir.

*snorri@sosialurin.fo*